# Leiðbeining um skúlakort

Vinarliga lesið leiðbeiningina gjølla innan skúlakortið verður tikið í nýtslu.

## Rætturin til skúlakort

Einans næmingar, ið fáa lestrarstuðul, hava rætt til skúlakort, og bert tey, ið hava tørv á at ferðast við Bygda- ella Oyggjaleiðum hjá SSL í og úr skúla.

## Søkja um skúlakort

Miðnámsskúlanæmingar kunnu viðmerkja á umsóknarblaðnum frá Mentamálaráðnum, um tey ynskja skúlakort. Tey kunnu eisini søkja á heimasíðuni hjá SSL.

Næmingar á hægri lærustovnum søkja á heimasíðuni hjá SSL um skúlakort.

Verður kortið burturmist ella óvirkið, verður søkt um nýtt kort á ssl.fo

Kortið verður sent skúlanum og útflýggjað har. Kortið kann brúkast alt lestrarskeiðið, t.v.s. um útbúgvingin tekur 3 ár, er kortið galdandi øll 3 árini, so ikki er neyðugt at bíleggja nýtt kort, tá flutt verður í hægri flokk. Kortið kann tó ikki nýtast í summarferiuni.

## Endurnýggja og rinda kort

Kortið er ókeypis, men hevur næmingurin tørv á nýggjum korti, skulu 100 kr gjaldast, áðrenn nýtt kort verður útskrivað.

Næmingar, ið hava óvirkin kort, verða biðin at seta seg í samband við skrivstovuna hjá SSL. Strandferðslan kannar og staðfestir um nýtt kort skal gerast. Um so er, skal næmingurin flyta peningin á kontu 9181-266.944.9 viðmerkt navn og „Skúlakort“. Tá peningurin er innkomin ella tá kvittanin er send til fyrisiting@ssl.fo ella handað inn á Farstøðina/høvuðsskrivstovuna, verður kortið gjørt og sent skúlanum. Strandferðslan tilskilar sær 14 dagar at gera kortini.

## Nýta og broyta kort

Skúlakortið kann nýtast at ferðast í og úr skúla eina ferð um dagin. Er kortið óvirkið, skal næmingurin rinda ferðaseðil, til hann aftur hevur eitt virkið kort. Tað ber til at broyta skúlakort, um næmingur skal í starvslæru ella flytir bústað. Broytingin fær virknað 24 tímar eftir, at hon er gjørd.

**Gevið gætur!** Kortið er persónligt og má **ikki** latast øðrum at nýta. Misnýtsla kann hava við sær, at næmingurin missir rættin til skúlakort.

Vinarliga

STRANDFARASKIP LANDSINS

Sjógøta 5 • Postsmoga 30 • 810 Tvøroyri
Tel (+298) 34 30 00 • T-postur: fyrisiting@ssl.fo

FIH/01.18